# Várvónir birtar í svenska vetrinum

**Royndu menninir á føroyska liðnum vóru betri fyri, enn teir plaga at vera hesa ársins tíðina. Tað var ein av orsøkunum til, at landsliðið so at siga setti svensku stórfavorittarnar upp á pláss**

LANDSLIÐS-FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Tað fer kalt niður eftir rygginum, tá tað fréttist, at fótbóltslandsliðið skal spæla tíðliga á árinum. Tíðliga á árinum er, áðrenn tað heima á landi verður farið undir fótbóltslandskappingina. At tað ikki er nøkur orsøk at mála við so myrkum pensli sást, tá landsliðið um hesa tíðina í fjør niðri í Spania tapti tepurt ímóti Finnlandi og Íslandi.

Og at føroyskir landsliðsspælarar hesa ársins tíðina eru eins væl fyri, sum teir í brøðratjóðunum kring okkum eru, fekst aftur ein staðfesting av mikukvøldið. Føroyar megnaðu málleysan javnleik á svenskari grund. Tað var eitt fínt úrslit, sum sjálvsagt ber við sær, at tað er grundarlag at rokna við meiri enn heiðurligum tapi, tá Allan Simonsen og hansara royndu menn um knappar tveir mánaðir skulu spæla HM undankappingardyst í Luksemburg. At rokna við øðrum enn heiðurligum tapi, tá Føroyar á somu Europa ferð skulu spæla í Moskva, er ivaleyst ov ólátað. Men avrikið og úrslitið ímóti einari av størstu og ríkastu tjóðunum í Europa var framúr gott.



*Føroyar eru í álopið, men Per Nilsson fær skallað bóltin burtur, meðan John Petersen, Óli Johannesen og Øssur Hansen fylgja við*
*Mynd: Scanpix/Nordfoto*

### Ikki hvør sum helst

Svøríki hevur fostrað nógvar stórar ítróttarmenn. Vit kunnu úr rúgvuni nevna Ingemar Stenmark og Björn Borg. Og vit kunnu leggja afturat, at landsliðsvenjarin hjá Onglandi hevur spælt fótbólt og leitt IFK Göteborg fram til sigur í Europa Cup, og at nógvir stórir fótbóltsspælarar sum t.d. Torbjörn Nilsson, Ralf Edström og Björn Nordquist hava umboðað bláa og gula litin.

Mikukvøldidð var tað fyri tað mesta eitt nýtt ættarlið av vaksnum spælarum, sum royndi seg. Allir hesir droyma um at gera somu brøgd sum omanfyri nevndu. Nú høvdu teir møguleikan at vísa landsliðsvenjaranum, svensku og útlendsku fjølmiðlunum og ikki minst millummonnunum til útlendsk feløg, sum vóru millum áskoðararnar, at tað skuldi roknast við teimum í framtíðini.

Við øðrum orðum átti motivatiónin at verið í toppi. Sviar vóru nærlagdir og ágrýtnir, men teir megnaðu ikki at vinna. Spælistílurin var ikki tann eyðkendi 4–4–2 hátturin. Ístaðin royndu teir seg við eini 4-2-3-1 skipan, har ætlanin var, at skapa møguleikar við djúpum renningum av miðjuni. Antin beint niðan á vøllin ella við at senda stikkbóltar út í síðurnar.

Mál fingu teir ikki burtur úr hesum, men sviar høvdu fleiri stórar møguleikar. Tann størsta fingu teir, eftir at Allan Mørkøre og Jóhannis Joensen í felag høvdu felt Zlatan Ibrahimovic, sum var vandamiklasti álopsmaðurin hjá svium. Markus Johannesson royndi seg úr ellivu metrum, Jákup Mikkelsen, sum fleiri ferðir var sera sannførandi, tveitti seg til høgru og bjargaði. Allan Simonsen vildi heldur ikki hesa ferð taka annan málverjan fram um hin. Í 2. hálvleiki nýtti Jens Martin Knudsen allar sínar royndir millum stólparnar, og ikki minst tá Christian Vilhelmsson tíggju minuttir út í 2. hálvleik var púra blankur, stórbjargaði veteranurin.

### Í góðari venjing

Føroyska liðið var ongantíð niðurspælt.

– Tað var týðuligt, at okkara menn trivust betri enn mótstøðumenninir á graslíkinum. Takið á bóltinum hjá teimum var í minsta lagi á sama støði sum hjá mótstøðumonnunum, og tað var sera hugaligt at staðfesta, at spælararnir vóru so væl fyri kropsliga.

Hetta sigur Jógvan Martin Olsen, hjálparvenjarin hjá Allani Simonsen. Tað var kanska hugsandi, at stóru og tungu menninir á føroyska liðnum fóru at hava trupulleikar at fylgja við, men sambært hjálparvenjaranum, so hava t. d. Uni Arge, Allan Mørkøre og Hans Fróði Hansen ongantíð verið so væl fyri so tíðliga á árinum, sum teir vóru mikukvøldið. Verjuspælið var sannførandi, miðvøllurin arbeiddi væl, og Todi Jónsson og Uni Arge vóru nakrar ferðir tætt við at fáa mál. T.d. tá Todi Jónsson í kapprenning við mótstøðumann fekk beint bóltinum ímóti málinum. Akkurát áðrenn Uni Arge slapp framat, fekk ein mótstøðumaður tonna á.

Tá vóru 33 minuttir farnir. Frammanundan hevði Øssur Hansen eftir horna sent langskot dygst framvið. Føroyingar høvdu í 1. hálvleiki seks hornaspørk, meðan sviar einki høvdu.

### Nógvar skiftiingar

Allan Mørkøre og Fróði Benjaminsen funnu væl saman í høgra borði, og Sámal Joensen og Øssur Hansen samanspældu væl í vinstru. John Petersen var bindiliðið mitt á miðvøllinum.

Tað stóð nógv á sentralu miðvallarunum. Í 2. hálvleiki gjørdi venjarin av at skifta teir allar út í senn. Súni Olsen, Pól Thorsteinsson og Rógvi Jacobsen komu í ótakksomu ódnirnar. Teir stóðu royndina við ein glans. Tað er sera hugaligt at staðfesta, at breiddin í hópinum er í lagi, og at ættarliðskluftin ikki nýtist gerast eyðsýndur trupulleiki.

Síðstu løtuna komu Andrew av Fløtum, Kurt Mørkøre og Christian Høgni Jacobsen á vøllin. Tað vil við øðrum orðum siga, at allir átjan spælararnir fingu høvi at royna seg. Óli Johannesen, Hans Fróði Hansen, Jóhannis Joensen og Allan Mørkøre vóru teir einastu, sum spældu alla tíðina, og teir vóru fínur botnur í verjuspælinum.

Ofta hevur tað víst seg, at tað hevur kostað nógv, at orkan hevur verið burtur síðstu løtuna. Soleiðis var tað ikki hesa ferð. Sviar royndu at leggja trýst á fyri at fáa eitt mál og harvið sleppa undan eyðmýkingini. Tað eydnaðist ikki at fáa mál. Føroysku spælararnir megnaðu at vera kaldir og oftast at spæla seg burtur úr fáu trongstøðunum í staðin fyri at sparka høgt og langt.

Fyrsta stigið í NM kappingini lívgar, og tveir mánaðir undan teimum báðu fyrstu HM undankappingardystinum í ár kennist tað sum ein sannur fløvi, at tað eydnaðist at spæla javnt á útivølli ímóti størstu og kendastu brøðratjóðini.

## Hagtøl

**70. Svøríki–Føroyar 0–0**
**NM kapping**
**Mikudagin 31. januar 2001 kl. 18.00**
**Í Tipshallen í Växjö í Svøríki**
**2.204 áskoðarar**

Dómarakvartett úr Noregi: Terge Hauge, Geir Åge Holen, Odd Arne Vangen og Roy Helge Olsen
Svøríki: 1. Håkan Svensson Halmstads BK – 2. Jimmy Tamandy, Malmö FF, 3. Frederik Karlsson, IFK Göteborg, 4. Per Nilsson, GIF Sundsvall, 5. Erik Edman, AIK – 6. Markus Johannesson, Örgryte IS, 7. Mikael Dorsin, Djurgårdens IF, 8. Christian Vilhelmsson, Stabaek (17. Jonas Lunden, IFK Göteborg, 75.), 9. Stefan Ishizaki, AIK (18. Christian Hemberg, Örgryte IS, 65.) – 10. Tobias Grahn, Lyngby FC, (16. Kristian Bergstöm, IFK Norrköping, 86.), 11. Zlatan Ibrahimovic, Malmö FF
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: 12. Johan Viland, IF Elfsborg, 13. Benjamin Tibebe, AIK, 14. Markus Lindberg, Helsingborgs IF, 15. Tomas Magnusson, Trelleborgs FF
Gult kort: Markus Johannesson
Venjari: Tommy Söderberg og Lars Lagerbäck
Føroyar: 1. Jákup Mikkelsen, 15/–26, Herfølge BK (16. Jens Martin Knudsen, 52/–139, Leiftur, 46.) – 9. Allan Mørkøre, 53/1, HB, 3. Jóhannis Joensen, 9/0, HB, 2. Óli Johannesen, 48/1, Hvidovre IF, 5. Hans Fróði Hansen, 15/1, B68, 6. Øssur Hansen, 42/2, B68 (13. Andrew av Fløtum, 1/0, HB, 77.) – 4. Fróði Benjaminsen, 7/0, B68 (18. Súni Olsen, 1/0, Zwolle Holland, 58.), 11. John Petersen, 29/3, Leiftur (14. Pól Thorssteinsson, 19/0, Valur, 58.), 7. Sámal Joensen, 20/0, Leiftur (15. Rógvi Jacobsen, 8/0, KÍ, 58.) – 8. Uni Arge, 33/7, ÍA (17. Christian Høgni Jacobsen, 1/0, NSÍ 77.), 10. Todi Jónsson, 42/9, liðformaður, FCK (12. Kurt Mørkøre, 32/2, Sogndal IL, 77.)
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: eingin
Gult kort: Sámal Joensen, Rógvi Jacobsen, Kurt Mørkøre, Pól Thorsteinsson
Venjari: Allan Simonsen
Hjálparvenjari: Jógvan Martin Olsen
Liðleiðari: Heðin Askham
Lækni: Jens Pauli Marstein
Fystioterapeutur: Álvur Hansen
Ferðaleiðari: Dánjal Andreasen



# Tríggir nýggir komu á listan

**Samlaða talið á landsliðsspælarum er nú 73, og um alt gongur, sum roknast kann við, so fer Óli Johannesen at spæla 50. landsdystin, tá HM undankappingardysturin í Moskva verður á skránni**

LANDSDYSTUR
*Jóannes Hansen*

Tað er ongantíð áður komið fyri, at átjan føroyskir spælarar hava verið við í einum og sama altjóða skrásetta landsdysti. Í fjør komu allir spælararnir inn í vinardystinum í Liktinstein, men tað vóru bara í ferðalagnum (Føroyar vunnu 26. apríl 1–0). Tá Føroyar 2. juli í 1995 taptu vinardyst í Íslandi 2–0, komu allir spælararnir á vøllin. Ta ferðina var tað merkisvert, at bara fjúrtan spælarar vóru í ferðalagnum.

Av teimum átjan spælarunum, sum í fyrrakvøldið vóru við til at greiða málleysa javnelikin í Svøríki, royndu tríggir seg fyri fyrstu ferð á a–landsliðnum.Tann fyrsti teirra at koma á vøllin var Súni Olsen. Tá hann í 58. minutti avloysti Fróða Benjaminsen, gjørdist hann 71. føroyski landsliðsspælarin, síðani Føroyar í 1988 fóru at spæla FIFA skrásettar landsdystir. Í alt hava Føroyar spælt 70 altjóða skrásettar dystir. Súni Olsen er føddur 7. mars í 1981. Hann er tískil 19 ára gamal, og hann var yngsti maður í ferðalagnum, sum var í Svøríki.

Hinir báðir nýggju menninir komu á vøllin í senn. Teir vóru Andrrew av Fløtum úr HB og Christian Høgni Jacobsen úr NSÍ.



*Óli Johannensen fer ætlandi at spæla sín 50. landsdyst, tá Føroyar í mars mánaði spæla í Moskva*
*savnsmynd*

Teir vóru á vøllinum síðstu trettan minuttirnar. Andrew av Fløtum er føddur 13. juni í 1979, og Christian Høgni Jacobsen er føddur 12. mai í 1980. Teir vóru báðir í ferðalagnum, sum var í Sveis í oktober, men hvørgin teirra kom á vøllin í 5–1 tapinum.

NSÍ telist ikki millum feløgini, sum hava verið best umboðað á landsliðnum. Christian Høgni Jacobsen er bara triði NSÍ maðurin á landsliðnum. Hinir báðir hava verið Djóni N. Joensen og so Jens Martin Knudsen. Spæliloyvið hjá málmansveteraninum er framvegis í Leiftri, men hann venur í ár við NSÍ og fer tískil sjálvsagt at umboða barndómsfelagið á landsliðnum seinni í ár (um hann verður úttikin!).

Súni Olsen er næsti spælarin, sum umboðar eitt hollendskt felag á landsliðnum. Hin spælarin, sum hevur umboðað eitt hollendskt felag á landsliðnum, er Jan Allan Müller. Hann spældi í síni tíð 34 dystir og skoraði fýra mál. Tá Føroyar 1. mai í 1991 megnaðu 1–1 í Belfast, umboðaði Jan Allan Müller Go Ahead Eagels.

### Óli næsti maður

Hvøjra ferð hann er á landsliðnum setur Allan Mørkørre nýtt met. Mikukvøldið var hann á landsliðnum fyri 53. ferð. Dygst í hølinum á vongverjanum er Jens Martin Knudsen, sum mikukvøldið var í málinum fyri 52. ferð. Teir báðir veteranarnir eru teir einastu, sum hava spælt fleiri enn hálvt hundrað landsdystir.

Næsti maður á listanum er Óli Johannesen. Mikukvøldið var hann fyri 48. ferð á landsliðnum. Um alt gongur, sum tað verður roknað við, so fer Óli Johannesen at spæla fyri 50. ferð á landsliðnum í HM undankappingar-dystinum á olympiska stadion í Moskva. Tað verður 31. mars. Fýra dagar frammanundan verður HM undankappingardystur í Luksemburg.

Næstu menninir á listanum eru Todi Jónsson og Øssur Hansen, sum mikukvøldið spældu fyri 42. ferð á landsliðnum.

Pól Thorsteinsson var mikukvøldið á landsliðnum fyri 20. ferð. Leikbannið eftir útvísingina í Prag í fyrraárið kostaði fyrrverandi Vals manninum seks landsdystir, og leikbannið fer eisini at kosta dystin í Luksemburg. Pól Thorsteinsson verður tøkur aftur í HM undankappingini, tá Føroyar fara at spæla í Moskva.

## Roy hugdi

Millum teir gott 2.000 áskoðararnar, sum í høllini í Växjö sóu føroyska liðið spæla, vóru eisini fleiri kend andlit.

Aftonposten skrivar, at millum áskoðararnar til dystin, taldust bæði fyrrverandi svenski landsliðsvenjarin, Tommy Nilsson, og ikki minst núverandi FCK venjarin, Roy Hodgson. Hodgson hevur eina stóra fortíð í svenskum fótbólti, har tað gjørdist til fleiri svensk meistaraheiti, og er hann tí sera høgt í metum millum fótbóltshugaðar sviar.

**jm**

# Vár Jákup

**Tvey umfør eru telvað í árligu Vár Jákup kappingini hjá Talvfelagnum Føroyar í keypmannahavn. Hetta er minniskapping um tiltikna Jákup Henriksen sála, sum uframt stovnari hevði sera heitt hjartað fyri føroyska talvfelagið**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Í 1993 tá Jákup Henriksen hevði serligan rundan føðingardag, nevnliga 64 ár, avgjørdu limir felagsins at kapping skuldi bera hansara navn. Jákup var tá væl fyri, telvaði við og var sum vanligt lívssálin hjá felagnum. Hann stutt sagt savnaði fólkið, og bar felagið. Tískil varð kapping gjørd til æru fyri honum tá hann enn var á lívið. Jákup andaðist tíðliga í 1995.

### Nógvir luttakarar

Vár Jákup er ein opin kapping og ikki bert fyri limir felgasins. 32 telvarar luttaka, átta í hvørjum bólki har øll telva ímóti øllum. Fyrsta umfar varð 22. januar, og telvað verður fram til 2. apríl tá sjeynda og seinasta umfar verður leikt.

Í triðja bólki luttekur eitt nú unga hálvføroyska gentan Miriam Olsen, sum hevur fult stigatal. Saman við henni í hesum bólki eru eisini føroyingarnir Dannie Nielsen og Jørgen Johannesen. Í øðrum bólki er Regin Reinert einsamallur føroyingur, eins og Finnbjørn Vang er í fyrsta bólki. Báðir hava teir eitt stig av tveimum.

Í meistarabólkinum luttaka tríggir føroyingar, Carl Eli Nolsøe Samuelsen, Terji Petersen og formaður felagsins Arild Rimestad. Bólkurin er rímiliga sterkur, har Esben Lund er við sínum 2282 ratigstigum hægstrataður. Terji er triðhægstur og Carl Eli fjórhægstur. Arild, 1905, hevur lægstu ratingina.

Bæði hjá Terja og Carl Eli hevur gingist væl. Báðir hava hálvtannað stig, og liggja saman við Esben Lund á odda. www.talv.dk er heimasíða felagsins.

Í donsku liðkappingini skal 1. lið hjá felagnum aftur í eldin sunnudagin, har KS verður mótstøðuliðið í hesum týðandi dysti. Føroyingarnir deila fyrsta pláss í triðju deild við Ballerup, og alt annað enn uppflyting er eitt vónbrot.

### Tríggir toppdystir

Ómetaliga javnt er í fyrstu deild í føroysku liðkappingini. Heili fimm lið liggja væl fyri. Bert trý stig skilja klaksvíkingar á fyrsta plássi niður til vestmenningar á fimta plássi, og tískil er spenningurin sera stórur undan sjeynda umfari. Ikki heilt long leið er niður til sandavágsmenn á aftasta plássi, sum tó mugu berjast sum leyvir undan niðurflyting.

Dystirnir sunnudagin verða hesir: Klaksvík–Hvalvík, Havnin–Vestmanna og Kollafjørður–Sandavágur.

### NM fyri ungdómar

Í døgunum 15.–18. februar verður Norðurlandameistaraheitið fyri ungdómar í Íslandi. Føroyska manningin er Hans Kristian Simonsen úr Kollafirði, Martin Poulsen, Olaf Berg, Jákup D. Joensen úr Havnini og Miriam Olsen.

Seinasta ár gekk tað fyrimyndarliga væl hjá føroysku telvarunum, og vónirnar eru eisini góðar til líknandi úrslit í Íslandi. Liðleiðari verður Martin Berg.

## Talvið hesa vikuna

**Lars K. Nilsson (1972)–Carl Eli N. Samuelsen (2053)**
**Vár Jakup (2), 2001**

1.e4 c5 2.Nc3 d6 3.Nf3 Nf6 4.d4 cxd4 5.Nxd4 a6 (Najdorf frábrigdi í sisilionsku byrjanini) 6.Be2 e6 7.Be3 Be7 8.f4 Qc7 9.Bf3 Nbd7 10.Qd2? Nb6 11.Nce2 d5! (Tá svartur fær d5 ígjøgnum í sisilionskum, fær hann nærum altíð betri støðu) 12.e5 Nc4 13.Qc1 (13.Qc3? Nd7 og frúgvin á c3 stendur illa) 13...Nd7 14.0-0 Qb6 15.Rb1 (15.b3?? Ba3 16.Qe1 Nxe3) 15...Qa5? 16.Nb3 Qc7 (hevði ikki sæð tað einfalda 16...Qxa2?? 17.Nc3 og frúgvin er fangað) 17.Bd4 b5 18.Qe1 a5 19.Nbc1 Ba6 20.Nd3 g6 21.g4 b4 22.Rd1 Ncb6 23.Qf2 (Áhugavert at offra c2 finnuna, og eg valdi at taka av tilboðnum) 23...Qxc2 24.f5? (Her er umráðandi at taka á b6 við tað sama, ella leika Rc1) 24...Bxd3 25.fxe6?? fxe6 26.Bxb6



0-0! (Betri seint enn ongantíð. Hendan borg í 26. leiki avgerð talvið, tískil var 25. fxe6 avgerandi feilur) 27.Rc1 Qa4 28.Rc7(?) (Her er hvítur í svárari tíðarneyð og seinastu leikir hansara eru allir nógv merktir av hesum) 28...Bd8 29.Bxd5 exd5 (Kundi tikið frúnna, men hetta er eins gott)
30.Qxf8+ Nxf8 31.Rcf7 Bxb6+ og svartur gavst samstundis sum tíðin fór. 0-1